# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

**Til afgørelse**

**6/26**
**25/00105-15 Eyka játtan til kirkjugarð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 21.01.2026 | 3/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2026 | 8/26 |
| 3 Býráðið | 29.01.2026 | 1/26 |
| 4 Býráðið | 26.02.2026 | 6/26 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Tekniskunevnd, fíggjarnevnd og Býráð |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Undir sáttmála samráðingum við arbeiðstakarna av umgraving av gamla kirkjugarðinum blivu ymiskar sparingar framdar. Hettar grunda á at ein metti at økið fekk tíð at seta seg soleiðis at tað var klárt tá ið vit skuldu taka hettar í brúk.<br>Eftir fyrru víðkan niðan móti Mirmansvegi í ein vestan, metti man at vit høvdu pláss til nøkur ár fram grunda á, at víðkaða økið kundi hava gravir, ið vóru dupultar. Hettar vísti seg seinni ikki at rigga grunda á at økið var ikki íligið(fest/sett seg). Har við er plásstørvurin voksin skjótari enn ætla.<br>Grunda á stóran tørv á gravarplássum verður neyðugt at fáa onkrar av sparingunum inn aftur í verkætlanina.<br>Talan er um spunsleggir ið eru tilætla at halda økini inntakt. Hettar kann gera, at vit skjótrari kunnu grava í feltini soleiðis at tey ikki detta/fella saman tá ið grivið verður í økini.<br>Sparingin var áljóðandi 1.080.540,- kr + mvg. Í uppruna tilboðinum. Mælt verður til at leggja 6% prísvøkstur á tilboði, ið gevur 1.145.372,40 kr uttan mvg. Samlaða játtani verður **við 6,25 % mvg 1.216.958.18 kr.**<br>Sparingin sæst undir pos.2.11 í uppskotinum – møguligar sparingar.<br>Á tekningum síggjast hvar spunslvegggirnir eru staðsettir fyri at fyribyrgja at økini fella saman.<br>Vit hava seinastu tíðina roynt at gjørt ymisk økir til gravarpláss fyri at nøkta tørvin. Veruleikin er at vit hava bert pláss til 10 dupultgravir og nakrar fáar einkult gravir inni í millum verandi gravarpláss. Metingin árliga er at 18-20 fólk fara foldum frá um árið í Fuglafirði. |

2

# Býráðið

**Dagfesting:** 26.02.2026 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir: Gudny Vang fyri Ólavur Larsen, Jóna Astrid L. Lambastein fyri Sonni á Horni

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | |
| 6/26 | 25/00105-15 | Eyka játtan til kirkjugarð |
| 7/26 | 26/00043-2 | Dagføring og endurnýggjan av gjaldskrá fyri Fuglafjarðar Havn |
| | | |

1

| | | | |
|---|---|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Bráðfengis tørvur á gravarplássum | | |
| Grundarlag | • Samráðingar skjøl<br>• Tekningar<br>• Mynd av gravarplássøkið – víðkan | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | X | |
| | Umsitingarligar | X | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at fáa spunslveggir inn aftur í verkætlanina. | | |
| Dagf | 19.01.2026 | | |

**<u>Tekniska nevnd 21. januar 2026:</u>** 3

Tekniska nevnd tók undir við tilmælinum og beinir málið víðari til Fíggjarnevndina og Býráðið til endaliga avgerð.

**<u>Fíggjarnevndin 22. januar 2026:</u>**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

**<u>Býráðið 29. januar 2026:</u>**
Mælt verður til, at eykajáttanin verður fíggjað av innistandandi.
Uppskotið var einmælt samtykt 9/0

**<u>Býráðið 26. februar 2026:</u>**
Býráðið tók við 2. viðgerð einmælt undir við tilmælinum um eykajáttan.

## 7/26
## 26/00043-2 Dagføring og endurnýggjan av gjaldskrá fyri Fuglafjarðar Havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 09.02.2026 | 2/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 11/26 |
| 3 Býráðið | 26.02.2026 | 7/26 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 25.02.2026 | 4/26 |
| 5 Fíggjarnevndin | 26.02.2026 | 13/26 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Vinnu- & havnanevnd og Fíggjarnevnd | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Grunda á at gjaldskráin er útgingin, er neyðugt at endurskoða og dagføra verandi gjaldsskráð. Tí verður mælt til at leingja verandi gjaldskrá til 01.03.2026, meðan viðgerð av møguligum gjøldum fer fram í viðkomandi nevndum.<br>Uppskot er til at fáa leigumál av/í egningarmiðstøðini við í gjaldskránina fyri Fuglafjarðar havn. Uppskot til mánaðarliga gjald av teimum stóru leigumálunum er 1.000,- kr.+ el mánarliga.Tilboð til leigaran er, at gera eitt ársgjald áljóðandi 10.000,- kr.+ el gjald árliga og skal gjaldast 15. januar við ársbyrjan.<br>Uppskot til mánaðarliga gjald av teimum minnu leigumálunum er 700,- kr.+ el mánarliga.Tilboð til leigaran er at gera eitt ársgjald áljóðandi 5.000,- kr. + el árliga og skal gjaldast 15. januar við ársbyrjan.<br><br>**Til fundin í Vinnu- og havnanevndini 25.02.2026**<br>Uppskotið til gjaldskrá er dagført aftaná fundi í fíggjarnevndini. Eisini eru prísirnir til loðsing dagførdir sambært Kunngerð nr. 201, frá 11. desember 2025 um loðsing, gjøld, eftirlit o.a. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Gjaldskrá fyri Fuglafjarð havn er farin úr gildið 31.12.2025 | | |
| Grundarlag | • Útgingin skipa-, vøru- og leigugjøld. | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | x |
| | Umsitingarligar | | x |

4

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at endurskoða gjøld og fáa leigumál í egningarmiðstøðini við í gjaldskránina. |
| Dagf | 29.01.2026 |

**Vinnu- og havnanevndin 09. februar 2026:**
Vinnu- og havnanevndin samtykti at taka leiguna fyri egningarmiðstøðina við í gjaldskránna og taka undir við uppskotinum við gjaldinum. Vinnu- og havnanevndin samtykti at Fuglafjarðar kommuna skal gjalda leigu fyri hølini ið teir brúka á egningarmiðstøðini. Gjaldið verður tað sama sum onnur leiga fyri. Vinnu- og havnanevndin samtykti at leingja verandi gjaldskrá til 01.04.2026. Endurskoðað gjaldskrá skal leggjast fyri vinnu- og havnanevnd til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2026:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini við hesum viðmerkingum:

- Tilboð til leigaran av smærri hølunum í egningarsmiðstøðini um gjørt verður eitt ársgjald áljóðandi skal vera 7.000,- kr. + el árliga og ikki 5.000,- kr. árliga.
- Skjalið við vørugjøldunum skal rættskrivast áðrenn tað verður lagt fyri býráðið.

**Vinnu- og havnanevndin 25. februar 2026:**
Eyðun á Lakjuni møtti vegna Kristian Martin Petersen.
Vinnu- og havnanevndin mælir til at taka gjaldsskránna fyri Fuglafjarðar havn av skrá til býraðsfundin 26.02.2026. Vinnu- og havnanevndin ynskir at hava ein arbeiðsfund saman við umsitingini at tillaga gjaldsskránna endaliga til býráðsfundin í mars 2026.

**Býráðið 26. februar 2026:**
Borgarstjórin beindi eftir áheitan frá Vinnu- og havnanevndini málið aftur í nevnd.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

6

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 20.00

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Eivin Breiðaskarð

Jóan Pauli Olsen

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Gudny Vang

Jóna Astrid Lambastein

Kristian Martin Petersen

7